DAGSINS MEINING

Politiska trúvirðið í vanda

Í skrivandi stund hava flokkarnir í landsstýrinum ikki megnað at loysa stjórnarkreppuna, men í gjár skuldi tjóðveldisflokkurin svara nøkrum spurningum frá Anfinni Kallsberg og fólkaflokkinum.

Uttan at vit kenna svarið, vita vit, at tjóðveldisflokkurin fer at siga nakað um, at hann tekur undir við prinsipiellu sjónarmiðunum hjá Tórbirni Jacobsen um Fiskavirking og einskiljing. Men samstundis fer hann væntandi at siga, at tey persónligu álopini hjá eysturoyartingmanninum á løgmann og Jørgen Niclasen »standa fyri hansara egnu rokning«. So er spurningurin, um svarið loysir stjórnarkreppuna?

Alt málið fekk eina nýggja vend seinasta fríggjakvøld. Tá kundi Dagur og vika staðfesta, at samsvar er ikki millum tað, sum Anfinn Kallsberg fyrr í vikuni segði við útvarpið, og tað, sum fútin upplýsti um málið hjá Anfinni Kallsberg.

Við útvarpið segði løgmaður, at hann sjálvur hevði sent fútanum málið um flytingar millum bátar og virkið í Norðdepli at kanna, áðrenn málið var fyrnað. Men Dagur og vika hevði fingið upplýst, at málið var fyrnað, tá Anfinn Kallsberg kom við tí.

Eru hesar upplýsingar rættar, er spurningurin, um løgmaður hevur lagt málið út sambært tí rætta sannleikanum. Hevur hann ikki gjørt tað, kann hann fáa eitt »forklaringsproblem« og trúvirðið á løgmann fær eitt skot fyri bógvin.

Upprunin til politisku orrustuna er, sambært Tórbirni Jacobsen, spurningurin hvussu Fiskavirking skal einskiljast.

Vit skulu minna á, at Fiskavirking er ogn hjá føroysku skattgjaldarunum, at fyritøkan virkar væl sum ein eind og hevur stórt fíggjarligt avlop á hvørjum ári. Tí áleggur tað bæði Framtaksgrunninum og landsstýrinum at fara skynsamliga fram, um Fiskavirking skal einskiljast.

At enda skal staðfestast, at skulu vit varðveita politiska trúvirðið, má landsstýrið annaðhvørt koma á áralagið aftur ella leggja frá sær, tí verandi støða undirgrevur politiska trúvirðið og álitið.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Hóska moralur og fullveldi saman?

Eivind Jacobsen
Strendur

Tobbi hevur enn einaferð skapt rumbul á politiska vígvøllinum. Sosialurin tók ein innskotnan setning burtur úr einari grein og síðan hevur ikki verið tosað um annað. Greinin stytti summarferiuna hjá fleiri landsstýrismonnum, Dagblaðið toldi ikki at verða trokað frá kassa 1, o.s.fr.

Sjálvandi er tað rætt sum Tobbi skrivar. Tað kann prógvast. Tí er trupult at skilja, hví allir mala sum hundur um heitan greyt. Hví melda menn ikki klárt út. Javnaðarflokkurin er ógvuliga tigandi. Sambandsflokkurin sigur sum minst. Nú málið er blást upp, er neyðugt at hava eina greiða støðu. T.v.s. at um tað kann prógvast, sum Tobbi sigur, skulu tingmenn taka støðu beinan veg. Einki uttanumtos. Um Føroyar lá í Afrika var støðan sjálvandi ein onnur. Tí eigur tað bert at vera ein spurningur um tíð, nær moralur telur meira enn fullveldi.

Tað, sum Tobbi brúkti eina langa grein uppá var, at fólkaflokkurin í vinnumálum ikki arbeiddi eftir samgonguskjalinum. Avvarðandi Landsstýrismaður sigur nakað annað.

Fyri at gera málið enn meira fløkt, kann eg nevna tríggjar søgur, sum eg havi hoyrt frá ymiskum álitandi persónum. Fyrsta var, at landsstýrismaðurin vendi sær til Fiskavirking og bað teir lata verða við at keypa flakamaskinu til ávíst slag av fiski_ Næsta søgan er, at ætlanin var at koyra Føroya Fiskavirking sundur í nógvar ymiskar eindir. Enntá var navn sett á, hvør skuldi hava hvørt virkið. Triðja søgan er, at landsstýrismaðurin ikki fylgdi tilmælum um hvør skuldi veljast í nevndina í Framtaksgrunninum. Eg havi tó ikki prógv fyri at hesar søgur eru rættar.

Slíkar søgur gera, at tú fert at ivast í, hvat veruliga ætlanin er við Føroya Fiskavirking. Tí hevði tað verið upp á pláss, at fingið eina greiða útmelding um, hvat ætlanin við Føroya Fiskavirking er. Uttanumtosið, vit í dag hoyra ger, at virðið á landsins ogn (Føroya Fiskavirking) minkar fyri hvønn dag sum gongur.

Altjóða flogvøllurin á Glyvursnesi

Hans Birgir Hansen

Tað er einki dulsmál, at ein hevur verið hart ímóti undirsjóvartunli undir Vestmannasundi, sum verður opnaður í februar komandi ár, ið vil skapa ferðsluruðuleika.

Tað hevur verið talan um at leingja flogvøllin í Vágunum til 1.800 metrar í fleiri ár og fáa sett upp glíðubreytina, sum hevur ligið innpakkað í fleiri ár í Vágunum.

Tað er ikki fíggjarliga forsvarligt at leingja flogvøllin í Vágunum og seta glíðubreytina upp, sum skal seljast av landinum er henda nýtilig hjá nøkrum flogvølli.

Tórshavnar Býráð hevur tvey modell av flogvølli úti á Glivursnesi – 1.800 metrar og 3.000 metrar – ið okkara býráðslimir skulu finna fram og fáa hesi støva av.

Tað hevur áður verið skriva um framtíðarstøðu Føroya við atliti til altjóða flogvøllin á Glivursnesi og til framtíðar handils- og vinnulív og loftvegis frakt.

Tað hevði verið upp á tíðina, at vit fáa kommunal- og landspolitikararna at taka hetta máli upp aftur og við atliti til komandi frálandaoljuvinnuna í Føroyum.

Tað hava verið gjørdar veðurlagskanningar úti á Glivursnesi seinastu nógvu árini, sum ein kundi hugsa sær blivu almannakunngjørdar í fjølmiðlunum.

Eg havi áður nevnt, at vit skuldu fingið Hotel Glyvursnes og fingið ein flogskúla at útbúgva flogskiparar/flogternur her úti á Glivursnesi í næstum.

Tað vil fáa ómetaliga stóran týdning fyri alt fjøltáttað virksemi í Havnini/Suðurstreymoy, tá slepst undan farleið vestur á flogvøllin í Vágunum.

Tað hevði verið gott at fingið tikið kjakið upp aftur í bløðunum og úti millum manna nú oljuvinnan byrjar bretsku megin markið, ið fær týdning.

Tað kann lendast í øllum veðri her úti – sjálvt í mjørka – tá vit hava fingið lendingartól og ljós.

Fjølbroytt gospelkonsert á Ólavsøku

TÍÐINDASKRIV

29. juli Ólavsøkudag kl. 17.00 verður ein stór gospelkonsert í Badmintonhøllini.

Bólkarnir ið luttaka eru I'am, Ataja og sangbólkurin United Voices. Lívdin kemur eisini at seta sín dám á hetta rimmar stóra og fjølbroytta tiltakið, og hartil verður okkurt annað spennandi á skránni. Ikki kann sigast annað enn, at tiltakið við sínum fjølbroyttu skrá er, fyri ein og hvønn sum hevur áhuga fyri tónleiki og sangi. I´am sum vit øll kenna frá m.a. Prix Føroyar, hava við sínum melodiøsa Rocktónleiki í tí heldur bleytari endanum, gjørt rættiliga innrás í øll hjørtu, ikki bara her á klettunum, men eisini uttanlands, har teir hava spælt víða um. Ataja sum er heldur "kontantari" í sínum tónleiki, er ein sera spennandi nýggjur tónleikabólkur, sum eingin ivi er í, at vit koma at hoyra nógv til í framtíðini. "Absolut" ein bólkur ið má hoyrast. United Voices, sangbólkurin sum vit eisini kenna sera væl og sum bleiv róst upp til skíggja av tí navnframa gospelsangaranum "Jessy Dixon" verður sjálvandi eisini har, so tað er lagt upp til eitt sera gott tiltak í Badmintonhøllini á Ólavsøku. Atgongumerkir eru at fáa í forsølu í kunningarstovuni, kostnaður kr. 100,-

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard
justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard
ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507 tel. 333843
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

UTTAN ÚR HEIMI

Mótmæla vanda-miklum farmi

Limir í umhvørvisverndarfelagsskapinum Greenpeace gjørdu vart við seg, tá eitt farmaskip við amerikanskum kjarnorkuburturkasti fór ígjøgnum avstralskan sjógv um vikuskiftið.

Farmurin er tann fyrsti, sum amerikanarar hava avskipað síðani atsóknirnar tann 11. september í fjør. Fleiri lond og felagsskapir hava mælt USA til at steðga flutninginum, tí tey bera ótta fyri, at yvirgangsmenn kunnu søkja at skipunum við tí vandamikla farminum

Mynd: Reuters

Læknar og sjúkrasystrar kunnu verða HIV-kannað

Hildið verður, at í hvussu er 700 starvsfólk í bretska heilsuverkinum eru HIV-smittað

BRETLAND
Árni Joensen

Tey, sum arbeiða í bretska heilsuverkinum, hava ikki skyldu at lata seg kanna, um tey eru HIV-smittað. Hetta er eisini galdandi fyri útlendingar, sum koma til Bretlands at arbeiða í heilsuverkinum, men nú verður tað hildið vera rættiliga sannlíkt, at fleiri afrikanskar sjúkrasystrar, sum arbeiða í Bretlandi, kunnu vera HIV-smittaðar, tí smittan er ógvuliga vanlig í Afrika.

Enn hevur heilsumálaráðið í London ikki gjørt av, um tað skal bjóða starvsfólkunum at lata seg HIV-kanna, ella um tað skal verða eitt krav, men blaðið The Times skrivaði í gjár, at ein HIV-kanning eftir øllum at døma verður sett í verk.

Eingin almenn skráseting er, men serfrøðingar halda, at meiri enn 700 HIV-positivar sjúkrasystrar eru í bretska heilsuverkinum, og at umleið 90 prosent eru úr londum í Afrika.

Síðani í august í fjør hevur ein nevnd arbeitt við spurninginum um møguliga HIV-kanning, men enn er einki uppskot komið frá nevndini.

Fleiri hundrað sivilfólk deyð í amerikansku bumbuálopunum

Amerikansku bumbuálopini í Afghanistan hava kostað fleiri hundrað sivilum afghanarum lívið, skrivar New York Times

AFGHANISTAN
Árni Joensen

Blaðið hevur upplýsingarnar úr einari frágreiðing um amerikansku bumbuálopini. Í frágreiðingini verður greitt frá, at í ellivu plássum, sum amerikansku flogførini hava bumbað, hava umleið 400 sivilfólk latið lív.

Sagt verður, at hóast amerikanska herleiðslan segði, at flogførini bara søktu at hernaðarligum málum, doyðu nógv sivilfólk í álopunum, tí bumburnar ofta eru ógvuliga sterkar.

Upprunin til frágreiðingina eru tíðindini um, at amerikansk flogfør herfyri søktu av tveimum bygdum í landspartinum Oruzgan, har minst 54 sivilir afghanar lógu eftirá.

Amerikanska verjumálaráðið hevur tikið atfinningarnar til sín. Sagt verður, at loftálop hava ofta óhepnar avleiðingar við sær, og tí verða muandi færri flogfør nýtt í álopum í Afghanistan nú. Ístaðin fyri eru hermenn sendir at leita eftir teimum Taleban- og al-Qaeda-hermonnunum, sum framvegis fjala seg í fjøllunum.

70 bygdir skolaðar burtur

Meiri enn 100.000 fólk har eysturi í India eru vorðin heimleys, eftir at tað hevur regnað ógvuliga illa seinastu vikurnar

INDIA
Árni Joensen

Tað hevur regnað sera illa har eysturi í India og í grannalandinum Bangladesh í seinastuni, og enn bendir einki á, at tað verður turrari.

Myndugleikarnir siga, at bara sunnudagin mistu umleið 40.000 fólk hús og heim í tí ógvusliga avfallinum, og at nú eru umleið 100.000 fólk í landnyrðingspartinum av landinum heimleys. Har eru umleið 70 bygdir skolaðar burtur.

Seinastu tríggjar vikurnar hava meiri enn ein millión fólk verið noydd at rýma frá húsi og heimi, men umleið helmingurin eru nú vend heimaftur. Hini halda til í skúlum og øðrum almennum bygningum.

Landspartastjórnin sigur, at hóast nógv fólk hava valt at fara heimaftur, er lítið at koma aftur til, tí nógv tey flestu húsini standa framvegis undir í vatni, og so at siga øll húsdjórini eru druknað.